## Learn To Ride On Hitlists

**Hóast føroyskur tónleikur ikki er so væl umboðaður á 15 teimum bestu hesa vikuna, so er eitt føroyskt lag, ið eingin klárar at syfta, 3. viku á rað liggur Learn To Ride On Waves ovast**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Afturhesa vikuna liggur lagið Learn To Ride On Waves á ovastu rók á 15 teimum bestu, hetta er triðja vikan á rað, at frálíka rokklagið hjá Høgn Lisberg liggur ovast á einasta almenna føroyska hitlistanum.

Lagið hevði verið 9 vikur innið á listanum áðrenn tað kom á ovastu rók, og við 12 vikum innið í hitanum eru einans 3 vikur til lagið verður koyrt av listanum. 15 vikureglan er ikki altíð so mjúk við tónleik, ið krevur meira enn eina lurting fyri at gerast fólkaogn. Hetta er synd, tí dygdirnar hjá Learn To Ride On Waves halda munandi longri enn tríggjar vikur afturat.

Hesa vikuna er tað fyrrverandi nummar eittarin, ið er tættasti avbjóðarin hjá Høgna, nevniliga Goodbye My Lover hjá James Blunt. Robbie Williams tryggjar at ungir penir solistar eiga topp 3 á listanum.

Føroyskur tónleikur er ikki serliga væl umboðaður á 15 teimum bestu fyri tíðina. Umframt Learn To Ride On Waves, ið liggur ovast, er næsta føroyska lagið á listanum hesa vikuna Fremmandur á 8. plássi. Hetta lag eigur Petur Pólson av fløguni Koma.

Poppkorn og lagið Droymi Mitt Um Dagin liggur beint aftan fyri Fremmandur á 9. plássi Men eisini í eykaløgunum er eitt føroyskt lag, her er talan um fyrsta lagið á nýggju Makrel fløguni, ið kom út í dag, Filthy Tongue. Síðsta lag Makrel høvdu á listanum gjørdist ein sonn landaplága, tað var Forever and Beyond.



*Høgni Lisberg heldur framvegis oddasessinum við lagnum, Learn to Ride on Waves*

### FAKTA

**15 tær bestu**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Høgni Lisberg | Learn To Ride On Waves |
| 2 | James Blunt | Goodbye My Lover |
| 3 | Robbie Williams | Advertising Space |
| 4 | Kent | Dom som försvann |
| 5 | Kelly Clarkson | Because Of You |
| 6 | Pink | Stupid Girls |
| 7 | Madonna | Sorry |
| 8 | Petur Pólson | Fremmandur |
| 9 | Poppkorn | Droymi Mitt Um Dagin |
| 10 | The Black Eyed Peas | My Humps |
| 11 | Mew | Special |
| 12 | Chris Brown | Run It |
| 13 | The Pussycat Dolls | Beep |
| 14 | The Black Eyed Peas | Pump It |
| 15 | Bryan Rice | No Promises |

**Eykaløg**

| | |
|---|---|
| Maria Mena | Just Hold Me |
| Daddy Yankee | Rompe |
| UFO Yepha | Op Med Håret |
| Fall Out Boy | Sugar We're Going |
| Makrel | Filthy Tongue |

# Várkonsertin 2006



*Framførslan hjá Aldubáruni verður hóskvøldið klokkan 20*

**Hóskvøldið 9. mars kl. 20.00, verður afturvendandi "Várkonsertin", ið er samstarv millum Felagid Føroysk Tónaskøld og Aldubáruna í Listasavninum í Havn**

KONSERT
*tíðindaskriv*

Tónaskøldini, ið fáa verk framførd á hesi konsertini eru:

Tróndur Bogason, Atli Petersen, Kári Bæk, Pauli Hansen og Sunleif Rasmussen.

Samstarvið millum Aldubáruna og Føroysku Tónaskaldini hevur mong ár á baki, og er hetta ein sera týdningarmikil táttur í føroyska tónleikalívinum, har íðkandi og skapandi listafólk innan tónlist, hittast og samstarvast.

Tónleikararnir í Aldubáruni eru hesuferð: Anna E. Klett, klarinett, Andrea Heindriksdóttir, floyta, Sámal Petersen, violin og Jóhannes Andreasen, klaver.

Í samband við konsertina, fara tónaskøld og tónleikarar, at greiða frá um tónleikin.

# Vestmenningar bjóða aftur til bátastevnu



*Aftur í ár verður skipað fyri bátastevnu í Vestmanna. Hetta er 5. árið á rað, at bátar úr øllum landinum seta stevnu í Vestmanna – og í ár verður stevnan 20. mai*

**Størsta og best umtókta bátastevnan í Føroyum verður á fimta sinni hildin í Vestmanna í summar**

BÁTASTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leygardagin 20. mai verður árliga bátastevnan hildin í Vestmanna.

Vestmenningar eru sannførdir um, at hetta er hin besta og størsta stevnan av slíkum slagi í Føroyum, har bátar og smærri før úr øllum Føroyum seta stevnu í Vestmanna.

– Hetta er 5. árið á rað, at bátastevnan verður hildin í Vestmanna, og tiltakið hevur verið ógvuliga væl umtókt. Undanfarin ár hava upp í 200 bátar úr øllum landinum sett stevnu í Vestmanna.

Í Vestmanna er hugnalig samvera, meðan bátarnir liggja, har tónleikur og sangur runga á kaiøkinum til langt út á kvøldið.

– Menn og kvinnur ganga borð um borð til hugna, og reyp og sangur eru eitt sereyðkenni fyri bátastevnuna í Vestmanna, sum tikið verður til.

Umframt bátsfólki, hava undanfarin ár eisini fólk við kampingvognum, motorsúklum og fólk á hestbaki vitjað stevnuna. Síðan eru tað øll tey mongu, sum koyra sær ein túr til Vestmanna at verða við í hesum hugna saman við bátsfólki og øðrum, bygdarfólki og gestum.

Tey luttakandi á bátastevnuni fáa suppu og annað, og um kvøldið verður skipað fyri stórum bátastevnudansi í Ítróttarhøllini.

Ætlanin er eisini at skipa fyri fleiri tiltøkum á havnalagnum og í Ítróttarhøllini.

– Talan verður um tiltøk, bæði fyri vaksin og børn, siga tey í Vestmanna.